# Stjóri til Tjóðpall Føroya

**Lýst verður eftir stjóra at seta frá 1. februar 2010 ella skjótast til ber.**

Stjórin kemur at hava listaligu og fyrisitingarligu ábyrgdina og standa fyri menningini av Tjóðpallinum í samstarvi við leiklista- og mentanarøkið í Føroyum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava visiónir um at menna leiklist í Føroyum og neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri Tjóðpall Føroya.

**Umsøkjarar skulu harafturat hava**
- *leiklistaliga útbúgving ella royndir innan leiklist*
- *leiðslu- og samstarvsevnir*
- *hollar royndir við fyrisiting og fíggjarstýring*

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er í løtuni lønt samsvarandi 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelagnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Treytað av, hvørjum fakfelag, komandi stjórin er limur í, kann talan vera um samráðingar um innskipan sambært sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum. Stjóraskeiðið er í mesta lagi 5 ár í senn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, forkvinnu í Leiklistaráðnum, á telefon 56 78 03 ella á annika@gransking.fo.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til Leiklistaráðið, sum er setanarmyndugleiki, í seinasta lagi 27. november 2009.

**Leiklistaráðið · Postrúm 212 · FO-110 Tórshavn**
**att. Annika Sølvará**

Tjóðpallur Føroya er almennur stovnur, skipaður við løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Játtanin til Tjóðpallin er 3,85 mió. kr. í 2009.

**Tjóðpallurin skal sambært lógini**
- *í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði, eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk*
- *geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist – sjónleiki so væl sum aðrari palllist*
- *tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra*
- *skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum*
- *fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.*

TJÓÐPALLUR FØROYA

SENDISTOVAN

Workshop

Stuðulstænastan

# Recovery

## Er tað møguligt at koma fyri seg aftaná álvarsligar sálarligar trupulleikar?

**Workshop í Norðurlandahúsinum**
**10. og 11. desember 2009**

- Hvat merkir tað, at koma fyri seg?
- Hvat skal til, um tað skal bera til?
- Hvat siga tann sjúki og avvarðandi hansara skal til?
- Hvussu kunnu viðgerðartilboð og stuðulstilboð hjálpa?

Workshoppin fer at vísa á nýggjari vitan um recovery, og møguleiki verður fyri kjaki í minni bólkum og millum øll í felag.

Hesir báðir dagarnir eru ætlaðir øllum teimum, ið hava royndir við álvarsligum sálarligum trupulleikum, avvarðandi, t.d. foreldur, hjúnarfelagar, systkin, vinir og næstrafólk.

Samstundis eru dagarnir eisini ætlaðir starvsfólki í psykiatriini og sosialpsykiatriini.

Undirvísari er Pernille Jensen, journalistur og cand.pæd., sum í fleiri ár hevur arbeitt við recovery, og m.a. hevur staðið fyri eini stórari danskari kanningarverkætlan um at koma fyri seg aftur.

Prísurin fyri báðar dagarnar er kr. 1000.

Áhugað fyri luttøku kunnu venda sær til: Odu Johansdóttir, tlf. 764103, T-postur odaj@naerverk.fo, í seinasta lagi 30. november 2009.

Workshoppin er tilrættisløgd sum samarbeiði millum Miljøterapeutisk Útbúgving í Føroyum (MTUF) og Nærverkið. Skeiðsváttan verður givin.

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

føroya gjaldstova

# Starv í umsitingini í KT-fyrisitingini á Gjaldstovuni

Nú KT-fyrisitingin økir um virksemið, verður søkt eftir fólki at standa fyri umsitingarligu uppgávunum hjá deildini.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- halda yvirlit yvir og avgreiða gjøld og rokningar hjá stovnunum fyri tænasturnar frá KT-fyrisitingini
- umsita yvirlit yvir stovnar og brúkarar í Landsneti
- umsita tænastusáttmálar millum stovnarnar og KT-fyrisitingina
- hava um hendi samskiftið millum KT-fyrisitingina og stovnarnar, bæði umvegis teldupost og við tilfari, sum verður lagt út á heimasíðuni hjá KT-fyrisitingini
- hava um hendi bókhaldið hjá KT-fyrisitingini
- standa fyri journaliseringini

Talan kann eisini verða um aðrar umsitingarligar uppgávur fyri KT-fyrisitingina.

**Krøv til starvið:**
Tú skalt í minsta lagi hava miðnámsskúlaútbúgving og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at tú hevur góð umsitingarlig evni, dugir væl at orða teg skrivliga, skilir bókhald, hevur góð evni at skipa gerandisdagin, og hevur lætt við at hava yvirlit. Tú skalt bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og kunna samstarva við onnur. Liggur væl fyri hjá tær at arbeiða við kt, er tað ein fyrimunur.

KT-fyrisitingin bjóðar, sum partur av Gjaldstovuni, spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har framkomnir arbeiðskarmar og –amboð verða brúkt.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er flokkað í 3. lønarflokki. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Nicolai M. Balle, deildarstjóra í KT-fyrisitingini, sum er at hitta á tlf. 792424 ella umvegis teldupost adressu nicolai.balle@gjaldstovan.fo

Gjaldstovan hevur heimasíðuna www.gjaldstovan.fo
KT-fyrisitingin hevur heimasíðuna www.ktf.fo

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum og møguliga viðmælum skal verða send Gjaldstovuni, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir.

**Umsóknarfreistin er 26. november í 2009.**

**Um Gjaldstovuna:**
Gjaldstovan er skipað í fýra høvuðsøki:
- Lønardepilin (lønarskipan, lønarbókhald, ráðgeving og leiðslukunning)
- Roknskapardeild (yvirskipaðar roknskaparuppgávur, bókhald, gjaldingar og leiðslukunning)
- Kervisfyrisiting (rekur búskaparskipan landsins)
- KT-fyrisiting

KT-fyrisitingin hevur uppgávuna at samskipa og miðsavna KT hjá landsfyrisitingini. Ein av tænastunum, sum KT-fyrisitingin bjóðar almennu stovnunum, er Landsnet, sum er felags kt-undirstøðukervi, sum allir almennir stovnar kunnu vera partur av. Í løtuni eru 23 stovnar og meira enn 600 brúkarar, sum brúka Landsnet tænastuna.

www.gjaldstovan.fo

DIMMALÆTTING 541200